# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2011

Ein lýsing av fiskivinnuni og virkseminum hjá felagnum

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Samandráttur og frágreiðing frá nevndini

Í 2011 vóru lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum 257 mió. kr. í mun til 314 mio kr. í 2010. Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum í 2011 var umleið 4,5 mia. kr., í mun til umleið 4,2 mia. kr. í 2010. Hetta er ein hækking á knappar 300 mió. kr. Eftir at samlaða útflutta nøgdin minkaði frá 2007-2009, kvinkaði útflutta tonsatalið eitt vet uppeftir í 2010. Í 2011 minkaði nøgdin tó aftur, og minkingin hevði verið uppaftur størri, var tað ikki fyri vaksandi útflutningin av makreli.

Feskfiskaveiðan í 2011 var á uml. 85.000 tons, sum er uml. 21.000 tons minni enn í 2010.

Ymisk mál hava merkt virksemið hjá felagnum farna árið.

Eitt av hesum er tilfeingisgjaldið. Felagið hevur yvirfyri Landsstýrinum og politisku flokkunum ført fram tað sjónarmið, at tað eigur ikki at verða lopið framav í spurninginum um tilfeingisgjald, og at felagið er sera ivasamt um ætlanirnar at áleggja eitt tilfeingisgjald. Orsøkin er m.a., at hetta merkir eitt versnað kappingarføri í mun til kappingarneytarnar. Ikki bara fiskivinnan fer at kenna sviðan av hesum, men alt føroyska samfelagið. Heldur enn at innføra ein tilfeingisskatt, eigur at verða arbeitt fram ímóti at fáa meira av fiski upp á land í Føroyum, til gagns fyri alt samfelagið og eisini landskassan.

Felagið heldur, at tað beinleiðis kann vera skaðiligt at gera almenna raksturin tengdan at einari árligari inntøku frá tilfeingisskatti, tí tað tá verður minni áhugavert hjá politisku skipanini at arbeiða fyri einari burðardyggari fiskiveiðu. Um tilfeingisskattur verður lagdir á fiskiskapin, fara pengar at mangla í hjá landskassanum, um tað verður neyðugt at minka kvotur ella fiskidagar komandi árini.

Felagið hevur eisini seinasta árið í fleri umførum heitt á Fiskimálaráðið um at avtaka uppboðssølukravið fyri óvirkaðan fisk. Felagið hevur við hagtølum frá Hagstovu Føroya dokumenterað, at uppboðssølukravið ikki tykist hava haft nakra ávirkan á nøgdina av óvirkaðum fiski sum fer av landinum, og at tað tí tykjast verða onnur viðurskifti enn

lógarverkið, sum avger, hvussu nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Samstundis skapar uppboðssølukravið eyka umsiting fyri ráfiskakeypararnar og tað almenna, umframt at tað verður verri hjá ráfiskakeyparunum at samstarva við seljararnar um eitt nú verkætlanir at økja um góðskuna á rávøruni. Harumframt ger uppboðssølukravið tað torført at fáa besta prísin á marknaðinum.

Skipanin við veiðuváttinum, sum varð sett í gildi 1. Januar 2010 hevur víst seg at viðføra stóra umsiting hjá útflytarunum, sum tykist vera óneyðug fyri at rækka endamálinum við skipanini (t.e. at forða fyri IUU-fiskiskapi). Hóast Fiskiveiðueftirlitið hevur gjørt eina elektroniska skipan, er eitt nú Íslendska skipanin einfaldari, og skapar ikki líka stóra umsiting. Felagið hevur verið í sambandi við Fiskimálaráðið og Fiskiveiðueftirlitið um hetta málið, og fer at arbeiða víðari við málinum í 2012.

Harumframt hava ymisk mál viðv. marknaðaratgongd verið á skránni. Nýggj tulking av ES-positivlistanum hevur m.a. gjørt tað sera tvørligt hjá saltfiskaframleiðarum at útflyta saltfisk til ES-marknaðin. Felagið hevur seinasta árið  brúkt nógva orku uppá hetta málið, sum ber brá av at vera ein teknisk handilsforðing, tí nýggja tulkingin ikki verður fylgd í fleiri evropeiskum londum.

Umframt hesi mál, hevur felagið gjørt sína ávirkan galdandi gjøngum arbeiðið í Fiskivinnuráðnum, har allar kunngerðir og lógaruppskot koma til ummælis.

# Innihald

**INNGANGUR .................................................. 3**

*Føroya Ráfiskakeyparafelag ........................................ 3*

**UM FISKI- OG FLAKAVINNUNA.......................................... 4**

LØNARÚTGJALDINGAR Í FISKIVINNUNI .................................... 4
ÚTFLUTNINGURIN ..................................................... 4
RÁVØRUTILGONGDIN TIL VINNUNA ....................................... 6
MIÐAL AVREIÐINGARPRÍSIR ............................................ 7
ÚTFLUTNINGUR AV HEILUM KØLDUM FISKI ................................ 7
AVREIÐINGAR UTTANLANDS ............................................. 8
FLAKAVINNAN ........................................................ 9
VEIÐULIÐIÐ ......................................................... 10
ÚTLITINI FYRI FISKISKAPIN UNDIR FØROYUM ............................ 10

**VIRKSEMI FELAGSINS Í FARNA ÁRI ..................................... 12**

TILFEINGISGJALDIÐ .................................................. 12
AVTØKA AV UPPBOÐSSØLUKRAVINUM FYRI ÓVIRKAÐAN FISK ................... 13
BROYTTA SKIPAN FYRI VEIÐIVÁTTANIR ................................... 13
ÚTFLUTNINGUR AV SALTFISKI TIL ES .................................... 13
MÁL Í FISKIVINNURÁÐNUM .............................................. 13

**SKJAL 1: FISKAVØRUÚTFLUTNINGUR Í 2010 OG 2011 ....................... 14**

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing er løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 9. mai 2012. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiski- og flakavinnuni og virksemi felagsins.

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Regin Mikkelsen, formaður

Jógvan Gregersen, næstformaður

Petur Mohr

Fríðin Ziskason

Ludvík við Stein

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru pr. 1. mai 2012:

| | |
|---|---|
| FarIta P/F | Sandoy Seafood P/F |
| Delta Seafood | Nevið P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Faroe Origin P/F |
| Scrabster Seafood | Kósin P/F |
| Tavan Sp/f | Faroe4Fish |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | FoFish Sp/f |
| Diamond Fish | |

# Um fiski- og flakavinnuna

## Lønarútgjaldingar í fiskivinnuni

Um hugt verður eftir lønarútgjaldingum í fiskiskapi og fiskaframleiðslu frá 2005 til 2011 sæst, at frá 2005 til 2007 vóru lønarútgjaldingarnar frá flakavinnuni umleið 350 mió. kr. í 2011 er hetta tal minkað til umleið 257 mió kr. og skulu vit heilt aftur til kreppuárini í 90'unum fyri at finna líknandi tal. Og tá er hædd ikki tikin fyri tann lønar- og prísvøkstur, sum hevur verið síðani tá. Fyri veiðuliðið sæst, at lønarútgjaldingarnar í 2006 og 2007 táttaðu í milliardina, men fullu niður á knappar 600 mió. kr. í 2009. Í 2010 og 2011 hava lønarútgjaldingarnar tó kvinkað nakað uppeftir, soleiðis at tær í fjør vóru knappar 800 mió. kr.

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 835.154 | 937.606 | 951.947 | 724.205 | 576.131 | 714.181 | 783.008 |
| Fiskavøruídnaður | 355.395 | 362.330 | 349.730 | 314.920 | 302.561 | 313.903 | 257.229 |
| Tilsamans | 1.190.549 | 1.299.935 | 1.301.677 | 1.039.125 | 878.692 | 1.028.084 | 1.040.237 |

## Útflutningurin

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í mynd 1. Í nøgd er útflutningurin í 2011 gjørdur upp til umleið 319.000 tons, sum er eitt vet lægri enn í 2010. Einasta orsøkin til, at minkingin ikki er uppaftur størri, er økti útflutningurin av makreli, sum øktist við 52.000 tonsum í 2011. Hóast samlaði nøgdin av fiskavørum minkaði, hækkaði útflutningsvirðið fyri samlaða fiskaútflutningin í 2011 í mun til 2010.



*Mynd 1. Útflutningur av fiskavørum: Nøgd og virði frá 2000 til 2011. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í skjali 1, sum sæst aftast í hesari frágreiðing, er eitt útgreinað yvirlit yvir útflutningsnøgd og –virði fyri flestu fiskasløg.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var heili 10.000 tons minni í 2011 samanborið við 2010. Hetta svarar til eina minking uppá 33 % eftir einum ári. Útflutningsvirðið av hesum vørum minkaði tó ikki líka nógv, minkingin í virðinum var uml. 162 mió kr. ella 21 %. Størsta orsøkin til at útflutningsvirðið ikki minkaði uppaftur meira er, at prísurin á upsafløkum í miðal var 5-6 kr. hægri per kilo í 2011 í mun til 2010. Miðal toska- og hýsuprísurin er eisini eitt vet hægri í 2011 enn í 2010.

Samlaði miðalprísurin fyri hesi fiskasløg er sostatt knappar 5 kr. hægri í 2011 í mun til 2010.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur/kg. | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2010 | 2011 | 2010 | 2011 | 2010 | 2011 |
| **Flak, fryst og kølt** | | | | | | |
| Toskur | 6.916 | 6.433 | 233.682 | 224.303 | 33,79 | 34,87 |
| Hýsa | 1.238 | 549 | 30.351 | 13.746 | 24,52 | 25,04 |
| Upsi | 19.039 | 10.799 | 454.734 | 316.224 | 23,88 | 29,28 |
| Onnur fiskasløg | 972 | 966 | 28.971 | 31.013 | 29,80 | 32,12 |
| **Tilsamans** | **28.165** | **18.747** | **747.737** | **585.285** | **26,55** | **31,22** |
| **Saltfiskur, flaktur og flak** | | | | | | |
| Toskur | 5.416 | 5.687 | 221.802 | 239.301 | 40,95 | 42,08 |
| Hýsa | 0 | 0 | 0 | 0 | | |
| Upsi | 2.850 | 2.640 | 48.727 | 49.778 | 17,10 | 18,86 |
| Onnur fiskasløg | 5.111 | 5.437 | 143.106 | 154.907 | 28,00 | 28,49 |
| **Tilsamans** | **13.377** | **13.763** | **413.635** | **443.986** | **30,92** | **32,26** |
| **Heilur fiskur, frystur og køldur** | | | | | | |
| Toskur | 3.884 | 2.430 | 67.567 | 46.584 | 17,40 | 19,17 |
| Hýsa | 4.008 | 3.130 | 65.193 | 52.666 | 16,27 | 16,83 |
| Upsi | 1.441 | 1.126 | 16.799 | 15.730 | 11,66 | 13,97 |
| Onnur fiskasløg | 25.619 | 16.540 | 338.320 | 303.305 | 13,21 | 18,34 |
| **Tilsamans** | **34.951** | **23.225** | **487.879** | **418.286** | **13,96** | **18,01** |

*Mynd 2. Útflutningur í nøgd og virði, býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa 2010 og 2011 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Nøgdirnar av útfluttum saltfiski vóru eitt vet størri í 2011 í mun í 2010.

Samlaða útflutningsvirðið av saltfiski er somuleiðis hækkað nakað í 2011 í mun til 2010. Orsøkin er bæði ein eitt sindur størri nøgd og at miðalprísurin er kvinkaður góða krónu uppeftir.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski, minkaði við á næstan 12.000 tonsum í 2010, sum er ein lækking við umleið einum tríðingi. Virðið er tó ikki lækkað líka nógv, tí munandi betri prísur fekst fyri heila fiskin í 2011.

## Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2011 var góð 20.000 tons minni enn í 2010, har hon var á leið 106.000 tons. Seinastu tvey árini er feskfiskaveiðin samanlagt minkað við einum fjórðingi. Tað er serliga nøgdin av upsa, sum er minkað, við umleið 13.000 tonsum. Øll feskfiskasløgini uttan flatfiskur eru tó minkað í nøgd í 2011.

Avreiðingarvirðið á feskum fiski var 827 mió. kr. í 2011 ímóti 903 mió. kr. í 2010. Hyggja vit longur aftur, kunnu vit síggja, at avreiðingarvirðið í 2007 var 1,16 mia. kr. og í 2006 1,25 mia. kr. Hetta merkir, at avreiðingarvirðið á feskum fiski var næstan 400 mió. kr. lægri í 2011 enn í 2006.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2010** | **2011** | **2010** | **2011** | **2010** | **2011** |
| **Toskur** | 13.807 | 12.142 | 193.088 | 185.253 | 13,98 | 15,26 |
| **Hýsa** | 4.907 | 3.357 | 55.490 | 42.124 | 11,31 | 12,55 |
| **Upsi** | 40.205 | 27.557 | 294.254 | 252.797 | 7,32 | 9,17 |
| **Annar botnfiskur** | 15.367 | 12.764 | 140.665 | 122.433 | 9,15 | 9,59 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.459 | 4.518 | 110.925 | 123.074 | 24,88 | 27,24 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 27.242 | 24.771 | 108.927 | 102.286 | 4,00 | 4,13 |
| **Veiðan tilsamans** | 105.987 | 85.108 | 903.349 | 827.967 | | |

*Mynd 3. Feskfiskaveiða: Nøgd, virði og miðalprísur í 2008 og 2010 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Mynd 3 vísir, at avreiðingarprísurin pr. kg. er hægri í 2011 enn í 2010 á øllum feskfiskasløgunum. Upsaprísurin er hækkaður næstan 2 kr./kg í miðal- og toska- og hýsuprísurin er hækkaður eina góða krónu fyri kg. Somuleiðis er avreiðingarprísurin á flatfiski hækkaður við meira enn 2 kr. kg.

Í 2010 tók toskafiskiskapurin fyri fyrstu ferð í 8 ár seg eitt sindur uppaftur, men er so minkaður aftur í 2011.

Fiskiskapurin eftir hýsu er nú minkaður í sjey ár á rað. Veiðunøgdin í 2003 var umleið 24.600 tons, meðan hon í 2011 bert var góð 3.000 tons, og er nú bert ein viðfáningur av nøgdini fyri seks árum síðani.

Upsafiskiskapurin, sum hevur verið javnt góður í nógv ár, er aftur í 2011 minkaður munandi, við umleið 13.000 tonsum.

## Miðal avreiðingarprísir

Mynd 4 vísir gongdina í miðal avreiðingarprísunum á toski, hýsu og upsa frá 2001 til 2011. Myndin vísir greitt, at gongdin við hækkandi prísum á toski og hýsu fekk ein bráðan enda í 2007. Seinastu tvey árini hevur miðalprísurin fyri øll fiskasløgini tó tikið seg tó nakað uppeftir aftur.




*Mynd 4. Miðalprísir á toski, hýsu og upsa frá 2001-2010 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Hækkandi miðalprísurin hevur merkt, at afturgongdin í avreiðingarvirðinum ikki hevur verið líka stór sum minkingin í nøgdini.

## Útflutningur av heilum køldum fiski

Síðani ógvusligu hækkingina í tíðarskeiðnum frá 2000 til 2003 hevur útflutningurin av heilum køldum fiski verið javnt minkandi, og er nú samanlagt lægri enn hann hevur verið fyrr í hesari øldini.




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.470 | 4.486 | 10.18 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.676 | 1.884 | 1.725 | 2.201 | 3.284 | 2.219 |
| Hýsa | 4.244 | 6.445 | 13.18 | 14.42 | 12.10 | 10.57 | 9.506 | 7.052 | 4.366 | 3.752 | 3.917 | 2.831 |
| Upsi | 1.814 | 5.210 | 11.26 | 13.20 | 9.374 | 11.87 | 4.214 | 3.932 | 1.574 | 3.348 | 1.528 | 1.126 |

*Mynd 5. Útflutningur av heilum køldum fisk frá 2000-2010 (Kelda:Hagstova Føroya).*

Samlaða nøgdin av toski, hýsu og upsa, sum fór óvirkað av landinum í 2011, var góð 6.000 tons í mun til sløk 9.000 tons í 2010

## Avreiðingar uttanlands

Mynd 6 vísir gongdina í avreiðingum uttanlands. Tað sæst, at eftir eina minking í 2010, hækkaðu nøgdirnar nakað aftur í 2011.




*Mynd 6. Landingar uttanlands 2000-2011 (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Samlaða nøgdin avreidd uttanlands í 2011 var góð 10.000 tons í mun til 5.600 tons í 2010. Tó kemur tað nú nærum ikki fyri, at toskur, hýsa og upsi verða avreidd uttanlands og orsøkin til hækkingina er tí í øðrum fiskasløgum.

## Flakavinnan

Samlað sæð hava seinastu nógvu árini verið avbjóðandi hjá føroysku flakavinnuni. Fallandi rávørunøgdir og óstøðug marknaðarviðurskifti hava verið høvuðsatvoldin til stóru avbjóðingarnar.

Seinnu árini hava vit sæð, at virki eru steðgaði, men tað vísir seg tó ofta, at virkini opna aftur við nýggjum eigarum. Stórsta hóttafallið í 2010 hendi, tá Faroe Seafood endaði í Fútarættinum seint í árinum. Hetta merkist sjálvsagt í samfelagnum við m.a. høgum arbeiðsloysi. Ognirnar hjá Faroe Seafood vórðu tó keyptar, og er virksemi nú á fleiri av virkjunum, sum Faroe Seafood fyrr átti.

Miðalstóru virkini hava tó klárað seg hampuliga væl og einstøk virki sera væl. Eyðkennið við flestu av hesum virkjunum er sera lítil skuld og góð tillagingarevnir í mun til minkandi rávørugrundarlag.

Stóra avbjóðingin seinnu árini við at fáa arbeiðsmegi til virkini er ikki til longur, og er hetta til frama fyri vinnugreinina sum heild. Arbeiðsloysið, sum er í løtuni, fer vónandi ikki at halda sær, og tá arbeiðsloysið lækkar aftur er sera sannlíkt, at flakavirkini aftur fáa trupulleikar við at fáa nokk av arbeiðsmegi. Hetta er ein sera óheppin ringrás, og eingin ivi er um, at loysn eigur at fáast á hesum trupulleika sum skjótast. Føroysk virkir eiga at fáa møguleikan frítt at seta eisini útlendsk starvsfólk, tá tað er neyðugt.

## Veiðuliðið

Sum tað eisini er greitt frá frammanfyri, var samlaða feskfiskaveiðan í 2011 umleið 85.000 tons, sum er tað lægsta í hesari øldini. Verður hugt eftir einstøku skipabólkunum sæst, at serliga lemmatrolarar og partrolarar hava fiskað munandi minni í 2011 enn í 2010, tó at afturgongd hevur verið í øllum skipabólkum.

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lemmatrol** | 30.878 | 32.405 | 32.503 | 21.840 | 20.235 | 17.484 | 10.992 |
| **Partrol** | 62.811 | 61.912 | 57.238 | 63.344 | 65.179 | 57.709 | 49.342 |
| **Lína** | 34.972 | 32.573 | 26.257 | 21.787 | 19.658 | 23.688 | 20.549 |
| **Snella** | 2.824 | 3.232 | 2.028 | 1.853 | 3.776 | 3.857 | 2.929 |
| **Gørn og annað** | 3.264 | 3.182 | 3.019 | 2.986 | 2.596 | 2.769 | 1.296 |
| **Reiðskapur tils** | 134.748 | 133.303 | 121.045 | 111.809 | 111.444 | 105.506 | 85.108 |

*Mynd 8. Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2005-2011 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)*

Føroyski heimaflotin hevur havt sera stórar avbjóðingar seinastu árini. Fallandi fiskiskapur og lágir prísir hava merkt vinnuna.

## Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2011/2012 skrivaði Havstovan um toskastovnin á landgrunninum, at eftir í fleiri ár á rað at hava havt vánaliga tilgongd, eru nú ein yvir miðal árgangur (2008) á veg, og at tilgongdin í 2009-11 var heldur frægari enn árini 2003-2007. Havstovan mælti til, at hesir árgangir fáa frið at seta til, og at uppvakstrarøkini nær landi og aðrastaðni fáa fríð í mest møguligan mun.

Toskurin á Føroyabanka er framvegis søguliga illa fyri og Havstovan mælir til at Føroyabanki verður friðaður fyri allari veiðu, og at hetta eisini fer at koma hýsustovninum til góðar.

Hýsustovnunrin er eisini sera illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hóast útlit eru til, at tilgondin í 2011 verður heldur frægari (2009 árgangurin), er hetta tó enn bert helvtin av einari miðal tilgongd . Havstovan heldur, at rættast hevði verið at bannað allari beinleiðis veiðu eftir hýsu og at minka um hjáveiðu av hýsu í øðrum fiskiskapum, tó at hetta er trupult, tí hýsa verður fyri tað mesta veidd í blandaðum fiskiskapi.

Upsastovnurin verður mettur at vera væl fyri og gýtingarstovnurin at vera hægri enn minstamarkið hjá ICES. Hinvegin skrivar Havstovan, at veiðutrýstið eftir upsa er 38 % størri enn tað, sum mælt verður til.

Yvirskipað mælir Havstovan til, at fiskidagaskipanin verður stillað rætt við at minka líðandi um dagatalið, tí at hetta hevði havt gagnliga ávirkan á allar tríggjar stovnarnar.

Samanfatandi mælti Havstovan til, at skerja dagatalið hjá bólkunum 3, 4 og 5 við 25 %, og at minka dagatalið í bólki 1 og 2 við 10%. og at brúka aðrar reguleringar fyri at geva smáfiski betri møguleikar at vaksa seg inn í fiskiskapin.

Samanumtikið mugu vit helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu ikki eru nakað serlig, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu ikki verður størri í 2012 í mun til 2011. Tó hava útlitini verið líka ring onkuntíð fyrr, og at tað tá kortini hevur bragdað aftur.

Upsastovnurin verður sagdur at vera væl fyri, og higartil í 2012 hevur upsafiskiskapurin verið nakað betri enn í 2011. Veiðitrýstið er tó framvegis høgt, og útlitini fyri nøgdunum av upsa eru tískil torfør at meta um.

# Virksemi felagsins í farna ári

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum av teimum málum, sum hetta seinasta árið hava myndað virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Seinast Føroya Ráfiskakeyparafelag hevði aðalfund var 5. apríl 2011. Fyri vali stóðu tá Regin Mikkelsen og Joen Magnus Rasmussen. Harumframt valdi Símun P. Jacobsen at taka seg úr nevndini. Regin Mikkelsen varð afturvaldur, og nývaldir vóru Fríðin Ziskason og Ludvík við Stein. Seinni skipaði nevndin seg við Regin Mikkelsen sum nýggjum formanni og Jógvan Gregersen sum nýggjum næstformanni.

**Tilfeingisgjaldið**

Felagið hevur yvirfyri Landsstýrinum og politisku flokkunum ført fram tað sjónarmið, at tað eigur ikki at verða lopið framav í spurninginum um tilfeingisgjald, og at felagið er sera ivasamt um ætlanirnar at áleggja eitt tilfeingisgjald. Orsøkin er m.a., at hetta merkir eitt versnað kappingarføri í mun til kappingarneytarnar. Ikki bara fiskivinnan fer at kenna sviðan av hesum, men alt føroyska samfelagið. Heldur enn at innføra ein tilfeingisskatt, eigur at verða arbeitt fram ímóti at fáa meira av fiski upp á land í Føroyum, til gagns fyri alt samfelagið og eisini landskassan.

Felagið skilir væl, at politiska skipanin ynskir at fáa betri javnvág á fíggjarlógini, men tað má og skal ikki vera motivatiónin til at innføra ein tilfeingisskatt. Heldur enn at nýta inntøkurnar frá tilfeingisskattinum til at káva útyvir ein alt ov stóran almennan útreiðsluvøkstur, eigur politiska skipanin at hava ryggin til at fremja neyðugar sparingar fyri at koma aftur á beint.

Felagið heldur, at tað beinleiðis kann vera skaðiligt at gera almenna raksturin tengdan at einari árligari inntøku frá tilfeingisskatti, tí tað tá verður minni áhugavert hjá politisku skipanini at arbeiða fyri einari burðardyggari fiskiveiðu. Um tilfeingisskattur verður lagdir á fiskiskapin, fara pengar at mangla í hjá landskassanum, um tað verður neyðugt at minka kvotur ella fiskidagar komandi árini.

Tað verður tá munandi torførari at gjøgnumføra tillagingar av kvotum og fiskidøgum, tá tað er neyðugt fyri at tryggja eina lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga umsiting av stovnunum. Hesin trupulleikin veksur bara, so hvørt sum tilfeingisskatturin verður víðkaður til fleiri fiskasløg. Gongdin á altjóða marknaðunum bendir á, at tað fer at gerast alt truplari at selja fisk, sum ikki er veiddur burðardygt. Tað er tí stak óheppið, um tann frammanundan torføra tillagingin av fiskiskapinum verður gjørd enn truplari.

## Avtøka av uppboðssølukravinum fyri óvirkaðan fisk

Felagið hevur seinasta árið í fleri umførum heitt á Fiskimálaráðið um at avtaka uppboðssølukravið fyri óvirkaðan fisk. Felagið hevur við hagtølum frá Hagstovu Føroya dokumenterað, at uppboðssølukravið ikki tykist hava haft nakra ávirkan á nøgdina av óvirkaðum fiski sum fer av landinum, og at tað tí tykjast verða onnur viðurskifti enn lógarverkið, sum avger, hvussu nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Samstundis skapar uppboðssølukravið eyka umsiting fyri ráfiskakeypararnar og tað almenna, umframt at tað verður verri hjá ráfiskakeyparunum at samstarva við seljararnar um eitt nú verkætlanir at økja um góðskuna á rávøruni. Harumframt ger uppboðssølukravið tað torført at fáa besta prísin á markanðinum.

Eitt samt Fiskivinnuráð tók í 2011 undir við áheitanini frá Ráfiskakeyparafelagnum um at avtaka uppboðssølukravið, og fundir við skiftandi landsstýrismenn um málið hava verið jaligir. Tó er uppboðssølukravið framvegis ikki strikað, hóast tað ikki eru stórar broytingar, sum skulu gerast í lóggávuni.

## Broytta skipan fyri veiðiváttanir

Skipanin við veiðuváttinum, sum varð sett í gildi 1. Januar 2010 hevur víst seg at viðføra stóra umsiting hjá útflytarunum, sum tykist vera óneyðug fyri at rækka endamálinum við skipanini (t.e. at forða fyri IUU-fiskiskapi). Hóast Fiskiveiðueftirlitið hevur gjørt eina elektroniska skipan, er eitt nú Íslendska skipanin einfaldari, og skapar ikki líka stóra umsiting. Felagið hevur verið í sambandi við Fiskimálaráðið og Fiskiveiðueftirlitið um hetta málið, og fer at arbeiða víðari við málinum í 2012.

## Útflutningur av saltfiski til ES

Nýggj tulking av ES-positivlistanum hevur gjørt tað sera tvørligt hjá saltfiskaframleiðarum at útflyta saltfisk til ES-marknaðin. Felagið hevur seinasta árið brúkt nógva orku uppá hetta málið, sum ber brá av at vera ein teknisk handilsforðing, tí nýggja tulkingin ikki verður fylgd í fleiri evropeiskum londum.

Felagið arbeiðir eisini saman við útlenskum samstarvspørtum um hetta mál.

## Mál í Fiskivinnuráðnum

Felagið hevur í farna árið gjørt sína ávirkan galdandi gjøgnum sína luttøku í Fiskivinnuráðnum. Millum tey mál, sum eru viðgjørd, eru m.a. Makrelfiskiskapurin, broytingar í kunngerðini um avreiðingar í Føroyum og uttanlands, Ungfiskafriðingarnar og ymiskar broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

# Skjal 1: Fiskavøruútflutningur í 2010 og 2011

Útflutningsvirði er gjørt upp í FOB=Free On Board
Kelda: Hagstova Føroya

| | Virði í 1.000 DKK | | | Nøgd í tonsum | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2010 | 2011 | Munur | 2010 | 2011 | Munur |
| Állur | 4 | 0 | -4 | 0 | 0 | 0 |
| Annar fiskur, i.a.n. | 205.436 | 131.544 | -73.892 | 18.765 | 9.714 | -9.052 |
| Annar flundrufiskur, i.a.n. | 375 | 1.005 | 630 | 11 | 39 | 28 |
| Annar ídnaðarfiskur, i.a.n. | 19.072 | 2.087 | -16.985 | 6.030 | 1.023 | -5.007 |
| Blálonga | 20.557 | 24.340 | 3.783 | 1.631 | 1.492 | -139 |
| **Brosma** | 56.049 | 54.678 | -1.371 | 2.286 | 2.221 | -65 |
| Búrfiskur | 1.332 | 3.313 | 1.981 | 60 | 94 | 34 |
| Glashvoysa | 988 | 2.772 | 1.785 | 15 | 36 | 22 |
| **Gullaksur** | 134.259 | 125.496 | -8.763 | 14.776 | 10.802 | -3.974 |
| Havtaska | 71.690 | 74.139 | 2.449 | 1.537 | 1.396 | -141 |
| Hávur | 2.356 | 1.357 | -999 | 159 | 100 | -58 |
| Hummari | 7.195 | 9.467 | 2.273 | 56 | 59 | 4 |
| Hvítingsbróður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hvítingur | 10.404 | 7.827 | -2.577 | 566 | 386 | -181 |
| **Hýsa** | 101.951 | 68.216 | -33.735 | 5.569 | 3.763 | -1.806 |
| Høgguslokkur | 8 | 0 | -8 | 1 | 0 | -1 |
| Jákupsskel | 21.158 | 18.164 | -2.994 | 888 | 886 | -2 |
| Kalvi | 8.334 | 6.562 | -1.772 | 158 | 134 | -23 |
| Kikarafiskur | 299 | 585 | 286 | 28 | 60 | 31 |
| Kongafiskur | 73.866 | 66.250 | -7.616 | 4.431 | 2.859 | -1.572 |
| Krabbi | 6.798 | 6.502 | -297 | 175 | 194 | 18 |
| Kræklingur | 0 | 5 | 5 | 0 | 0 | 0 |
| Laksur | 1.338.081 | 1.611.891 | 273.810 | 33.695 | 46.055 | 12.360 |
| Langasporl | 2.463 | 872 | -1.591 | 239 | 68 | -171 |
| Livur | 2.551 | 1.978 | -573 | 323 | 105 | -217 |
| Lodna | 11.069 | 23.483 | 12.414 | 3.531 | 9.072 | 5.540 |
| **Longa** | 100.688 | 112.283 | 11.595 | 3.582 | 3.990 | 408 |
| Lýsi | 12.554 | 3.032 | -9.522 | 2.091 | 430 | -1.662 |
| Lýsingur | 6.808 | 0 | -6.808 | 2.843 | 0 | -2.843 |
| Makrelur | 309.823 | 709.994 | 400.171 | 50.991 | 103.222 | 52.232 |
| Nebbasild | 4.109 | 0 | -4.109 | 2.585 | 0 | -2.585 |
| Onnur skeljadjór o.l. i.a.n. | 1.240 | 343 | -897 | 3.390 | 1.407 | -1.983 |
| Reyðsprøka | 13.261 | 10.013 | -3.248 | 470 | 383 | -87 |
| Rogn | 8.154 | 9.772 | 1.619 | 329 | 385 | 56 |
| Rækjur | 94.872 | 86.971 | -7.900 | 6.686 | 5.670 | -1.016 |
| Sardin | 0 | 1.833 | 1.833 | 0 | 719 | 719 |
| Síl | 69.954 | 8.724 | -61.230 | 2.194 | 238 | -1.957 |
| Sild | 229.004 | 288.543 | 59.539 | 62.445 | 50.100 | -12.344 |
| Skrubba | 10 | 31 | 21 | 2 | 4 | 2 |
| Skøta | 2.362 | 2.454 | 92 | 177 | 190 | 13 |
| Slógv | 17.632 | 14.287 | -3.345 | 21.247 | 13.694 | -7.554 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Steinbítur | 3.904 | 4.530 | 626 | 228 | 264 | 36 |
| Stinglaksur | 17.646 | 9.018 | -8.628 | 887 | 457 | -430 |
| Svartkalvi | 54.178 | 62.483 | 8.304 | 1.910 | 1.923 | 12 |
| Svartkjaftur | 115.400 | 78.192 | -37.208 | 32.093 | 14.513 | -17.581 |
| **Toskur** | 525.414 | 512.881 | -12.534 | 16.304 | 14.631 | -1.673 |
| Tunfiskur | 0 | 311 | 311 | 0 | 30 | 30 |
| Tunga | 6.514 | 4.920 | -1.595 | 258 | 173 | -85 |
| **Upsi** | 550.743 | 399.562 | -151.181 | 26.565 | 16.248 | -10.317 |
| Tilsamans | 4.240.564 | 4.562.708 | 322.144 | 332.205 | 319.226 | -12.979 |